GRANSKINGARDEPILIN FYRI SAMFELAGSMENNING



# Nógv at læra úr Norra

## Ferðafrásøgn frá vitjan við Gloppenfjørðin

Dennis Holm

ARBEIÐSRIT 28/2011

ISBN 978-99918-60-21-3

# Nógv at læra úr Norra

## Ferðafrásøgn frá vitjan við Gloppenfjørðin

Dennis Holm

*Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning*

**ARBEIÐSRIT NR. 28/2011**

*Um arbeiðsrit:*

**Arbeiðsrit eru samfelagsfakliga grundað arbeiði, sum eru minni í vavi og dýpd enn veruligar granskingarverkætlanir. Hesi rit kunnu eitt nú verða umbidnar kanningar, t.v.s. kanningararbeiði, sum Granskingardepilin ger móti gjaldi. Hetta kunnu eisini vera ávegis arbeiði av størri granskingarverkætlanum, undirvísingar- og kunningartilfar ella líknandi. Arbeiðsrit verða altíð skrivað á føroyskum. Hava fólk handrit, sum tey halda eru egnað til útgávu í Arbeiðsriti, eru tey vælkomin at seta seg í samband við depilin (sí adressu á forsíðuni).**

**Arbeiðsrit 28/2011: Nógva at læra úr Norra ï  ferðafrásøgn frá vitjan við Gloppenfjørðin**

Dennis Holm 2011

Útgevari: Granskingardepilin fyri Samsfelagsmenning
Prent: Ikki prentað (net-útgáva)
**ISBN: 978-99918-60-21-3**
**ISSN: 1601-9423**

# Innihald

FORORÐ...6
UM VERKÆTLANINA “AKTIVE ILDSJÆLE”...7
NÓGV AT LÆRA AV NORÐMONNUM...9
SJÁLVBOÐIN BYGT ALTJÓÐA STADION TIL FRÆLSAN ÍTRÓTT...11
VATNKRAFTVERK GOTT ÍSKOYTI HJÁ BØNDRUM VIÐ GLOPPENFJØRÐIN...15
ENTREPRENØRSKAPUR Í BARNAGARÐI Í NORRA...17
GÓÐA TÍÐ TIL AT LEGGJA STOVNAR SAMAN...20
UTVIKLINGSLAG – HALDA FOKUS Á MENNING Í BYGDINI...22
GAMALT FJÓS UMBYGT TIL MATAR- OG VEITSLUSAL...26
FRIVILLEGSENTRALEN – SJÁLVBOÐIN HJÁLPA...28
FÁA VIT NÓG NÓGV FYRI PENGARNAR?...30
LANDBÚNAÐUR OG FISKIVINNA – OG UNGDÓMURIN...39

# Myndir

Kort yvir Sogn og Fjordane fylke...9
Kort yvir Gloppen kommunu...9
Sólarris í Søreide í Gloppen kommunu í oktober 2011...10
Byrkelo stadion úr luftini...11
Byrkjelo Stadion...12
Byrkjelo stadion...13
Umboð fyri Breimsbygda IL greiddu frá...14
Vatnkraftverkið Jardøla Kraft...15
Vatnið verður tikið úr ánni 300 m. hægri uppi...15
Ein av eigarunum av Jardøla Kraft greiðir frá...16
Teina Barnehage, barnagarður við høsnagarði...17
Børnini halda sjálvi skil á...17
Britt Glomnes Willumsen leiðari av Teina Barnehage greiðir frá...18
Høsnarhúsið í Teina Barnehage...19
Britt Glomnes Willumsen leiðari av samanlagda barnagarðinum greiðir frá...20

Nýggjur graslíkisvøllir við barnagarðin í Reed ... 21
Hyen liggur í vøkrum umhvørvi ... 22
Skjótifelagið nýggj høli ... 23
Nýggi barnagarðurin í Hyen ... 24
Leiðarin av Hyen Utviklingslag og skúlastjórin (longst til vinstru) ... 25
Kvia, Gloppen ... 26
Kvia, Gloppen ... 27
Frivillegsentralen, Gloppen ... 28
Tvey fólk arbeiða á Frivillegsentralen ... 29
Trivselshagen ... 30
Forhøll ... 31
Musikkskúlin Trivselshagen ... 31
Films- og miðlabreytin í Trivselshagen ... 32
Biografur ... 33
Konsertsalur ... 34
Tað stóra dansi-venjingarhøli ... 34
Dramasalur ... 35
Fjarlestrarhøli ... 36
Bókasavn ... 36
Kantina ... 37
List í Trivselshagen ... 38
Skúlanæmingar á *Gardsarbeid* á Felda Fellesfjøs ... 39
Per Asbjørn Felde (t.h.) greiðir frá ... 40
OilSim-strategispælið hjá Simprentis ... 41

# Fororð

Í døgunum 2. til 5. oktober 2011 var arbeiðsfundur í verkætlanini **Lærings- og inspirationsnetværk for aktive ildsjæle i 4 nordiske lokalsamfund i udkantsområder** í Gloppen kommunu í Norra. Høvuðsbýurin í Gloppen kommunu er Sandane, sum liggur 3½-4 tímar (í bussi) norðanfyri Bergen.

Vitjanin í Gloppen var sera áhugaverd og gav ikki minst góðan íblástur sæð við føroyskum eygum. Í vikunum eftir vitjanina var ein røð av greinum skrivaðar um ferðina. Áhugin fyri greinunum hevur verið sera stórur og nógv fólk hava vent sær til undirritaða í samband við greinarøðina frá Norra-ferðini.

Av somu orsøk eru hesar greinar savnaðar í einari útgávuni, soleiðis at áhugaði lætt kunnu leita fram tilfarið til íblástur.

Greitt er, at vit kunnu læra nógv av grannum okkara fyri eystan.

*Vágur 30. nov. 2011*

*Dennis Holm*

# Um verkætlanina ñAktive ildsjæleò

Á heysti 2010 byrjaði verkætlanin **Lærings- og inspirationsnetværk for aktive ildsjæle i 4 nordiske lokalsamfund i udkantsområder**, sum er ein verkætlan, sum er fíggjað av Nordisk Ministerråd.

Við í verkætlanini eru fýra útjaðarasamfeløg í Norðurlondum: Vágur í Føroyum, Ísafjørðurin í Íslandi, Gloppen í Norra og Janderup í Danmark.

Verkætlanarleiðari er Karen Vestergaard-Poulsen, sum er stjóri á *Det Danske Europa Institut A/S*. Tey fýra útjaðarasamfeløgini eru annars umboðaði soleiðis:

Janderup, Danmark: Hans Christian Jensen, Formand for Lokalrådet.

Gloppen Kommune, Sandane, Norra: Olav Fure, oppvekstsjef Gloppen Kommune.

Vágur, Føroyar: Dennis Holm, leiðari á Granskningardepilin fyri Samfamfelagsmenning.

Ísafjørður, Ísland: Margrét Geirsdóttir, Forstödumadur Skola- og Fjölskylduskrifstofu.

## Endamál við verkætlanini

Endamálið við verkætlanini **Lærings- og inspirationsnetværk for aktive ildsjæle i 4 nordiske lokalsamfund i udkantsområder** er í fyrsta umfari:

- at fáa skapt eitt læringsnetverk
- at styrkja um førleikarnir hjá eldsálum
- at kunna um nýggj læringsamboð
- at kunna um loysnings-modellir hjá hvørjum øðrum
- at økja um kunnleikan til norðurlendskt mál og mentan og norðurlendskan samleika

Harnæst er endamálið:

- at skapa eitt felags virtuelt rúm
- at kunna og læra um netverk
- at skapa rúm fyri útveksling av royndum
- at skapa góðsku og nýskapan viðvíkjandi læring
- at betra um eginleikarnir við KT sum samskiftisamboði
- at geva íblástur til ”aktive citizenship” / at íbúgvar verða virknir
- at gera vart við mentunarligar ymiskleikar

Tann fyrsti fundurin var í Janderup í vestur Jútlandi í Danmark í døgunum 3. til 7. oktober 2010. Síðani hava verið fundir í Vági í mai 2011, í Ísafjørðinum í august 2011 og í Gloppen í oktober 2011. Seinasti fundur í verkætlanini verður í Janderup í Danmark á vári 2012.

Verkætlanin hevur egna heimasíðu: www.aktinord.dk har tú kann lesa meiri um verkætlanina, umframt at tað á heimasíðuni eru myndir frá teimum fýra bygdasamfeløgunum, sum eru við í verkætlanini.

## Nógv at læra av norðmonnum

Í fyrstu viku av oktober 2011 var fjórði fundur í verkætlanini **Lærings- og inspirationsnetværk for aktive ildsjæle i 4 nordiske lokalsamfund i udkantsområder**. Fundurin var í Gloppen kommunu í Norra.






Kort yvir Sogn og Fjordane fylke




**Kort yvir Gloppen kommunu**

Gloppen kommuna liggur við Gloppenfjørðin, sum er ein síðufjørður til Norðfjørðin, miðskeiðis millum Bergen og Ålesund. Gloppen kommune er partur av Sogn og Fjordane fylke. Í kommununi búgva 5.696 fólk (2010). Størsta plássið í kommununi er Sandane við 2.100 íbúgvum, har kommunala høvuðssætið eisini er.

Á ferðini í Gloppen kommunu varð vitjað á fyritøkum, á kommunalum stovnum og ikki minst hjá ymiskum áhugafelagsskapum innan ítrótt og mentan. Greitt er eftir ferðina, at vit í Føroyum hava nógv at læra úr hesum partinum av Norra.



**Sólarris í Søreide í Gloppen kommunu í oktober 2011**
*Mynd Erik Dyhr Thomsen*

# Sjálvboðin bygt altjóða stadion til frælsan ítrótt

Í bygdini Byrkjelo, sum er í eystara parti av Gloppen kommunu (sí kort á síðu 9), hava tey eina langa røð av verkætlanum, sum eru grundaðar á sjálvbodna arbeiðsmegi, á ”*dugnad*”, sum tey siga i Norra.



**Byrkelo stadion úr luftini**

Felagið Breimsbygda Idrettsslag (Breimsbygda IL) varð stovnað í 1911. Í 1989 løgdu ítróttarfeløgini í grannabygdunum Byrkjelo (300 íbúgvar) og Reed (365 íbúgvar), vanliga nevnd Breim ella Breimsbygda, tí tær liggja við Breimsvatn, saman. Umframt frælsan ítrótt, so hevur Breimsbygda IL eisini fótbólt, hondbólt, flogbólt, orienterings-renning og spinning.

## Byrkjelo stadion

Ein av stóru verkætlanum hjá Breimsbygda IL er stadion til frælsan ítrótt, sum liggur í heilt einastandandi vøkrum náttúru umhvørvi í bygdini Byrkjelo.






**Byrkjelo Stadion**

Upprunaliga bygdu tey í Byrkjelo eitt stadion, sum bæði var til frælsan ítrótt og fótbólt, í dag verður Byrkjelo stadion serliga brúkt til frælsan ítrótt, meðan tey hava nýggjan graslíkisvøll í grannabygdini Reed. Í 1981 varð grús rennibreytin á stadion broytt til rennibreyt við kunstvølli. Og í samband við NM í frælsum ítrótti 12. til 14. august í summar, varð undirlagið á rennibreytini skift til nýggjasta slag av rennibreytum, soleiðis at stadion til frælsan ítrótt í Byrkjelo á hesum økinum nú er á støðið við onnur altjóða stadion til frælsan ítrótt.




**Byrkjelo stadion**

## Sjálvboðin arbeiðsmegi drívmegin

Tað óvanliga í Byrkjelo er, at allar útbyggingar á stadion økinum hava verið gjørdar við sjálvbodnari arbeiðsmegi, har kommunan og lokalar fyritøkur tó hava rindað tilfar.

Fólkini handan Breimsbygda IL søgdu frá einari støðu í 1999, tá tey skuldu hava NM í frælsum ítrótti. Tríggjar vikur undan NM vísti borgarstjórin á, at tey kanska áttu at havt fleiri áskoðarapláss. Sjálvboðin fóru beinanvegin ígongd og áðrenn NM høvdu tey gjørt 300 nýggja sitiplássum afturat á Byrkjelo stadion. Einastu útreiðslurnar vóru til tilfar, arbeiðið varð gjørt ólønt.

## Lagt seg á altjóða støðið

Áhugavert er eisini, at hóast tað bert búgva stór 600 fólk í økinum, so hevur av fyrstan tíð verið lagdur dentur á, at byggjast skuldi á altjóða støðið, soleiðis at altjóða kappingar kundu haldast á Byrkjelo Stadion.

Hetta hevur eisini ført við sær, at NM í frælsum ítrótti hevur verið hildið í Byrkjelo fleiri ferðir, umframt at tey í fleiri ár hava havt altjóða kappingar, Byrkjelo Games, við luttøku av heimsstjørnum sum t.d. Merelen Ottey av Jamaica á 100 og 200 m. og bretanum Steve Cram á 1.500 m.

Aftur í summar kom Byrkjelo Stadion á heimskortið, tá norski spjótkastarin Andreas Thorkildsen við NM kastaði 90,61 m, sum er longsta kastið í heiminum í ár (2011).

## Fáa sjálvbodni inn við móðurmjólkini

Øll fyriskipanin av NM í frælsum ítrótti í summar varð grundað á sjálvbodna arbeiðsmegi, á ”*dugnad*”. Tey 600 fólkini, sum sjálvboðin og uttan samsýning vóru í gongd hesar dagarnir miðskeiðis í august megnaðu við “*dugnad*” at savna góðar 1,2 mió. krónur til ítróttarfelagið Breimsbygda IL.




**Umboð fyri Breimsbygda IL greiddu frá**

Grundalagið undir at kunna fáa so nógv burturúr sjálvbodnar arbeiðsmegi er, at tey í grannabygdinum Byrkjelo og Reed, hava sum grundarlag undir øllum frítíðarítrivum, at øll skulu verða við. Eitt dømi um hetta er ítróttar-fríggjadagur, sum er á Byrkjelo stadion hvønn fríggjadag. Tá er einasta kravið, at børn og ung, sum luttaka, skulu verða í ítróttarbuksum og –skóm, og kunnu tey annars gera alt tey hava hug til, antin talan er um seriøsar venjingar ella bara heilt óskipað spæl.

Sum ein av fyriskiparunum segði: *Vi bruker myka tid på at inkludere alle i “vi-fællesskabet”.*

## Vatnkraftverk gott ískoyti hjá bøndrum við Gloppenfjørðin

Seinastu árini er tað vorðið alsamt meiri vanligt, at smærri privat vatnkraftverk verða bygd í Norra. Í Gloppen kommunu eru tað nú 20 smá vatnkraftverk, sum framleiða el, sum tey selja til eina størri el-framleiðara í økinum. Tey privatu vatnkraftverkini í Gloppen eru frá heilt smáum verkum, sum framleiða til 1-2 húsarhald, til størri kraftverk, sum framleiða el til fleiri túsund húsarhald.




**Vatnkraftverkið Jardøla Kraft**



**Vatnið verður tikið úr ánni 300 m. hægri uppi**

Tað áhugaverda við hesum vatnkraftverkum er, at tað í flestu førum eru bøndur, sum hava sligið seg saman og bygt vatnkraftverk, sum kunnu draga nyttu burturúr stóru nøgdunum av vatni, sum renna í áunum kring Gloppenfjørðin.

Gloppen kommune er landbúnaðarøkið burturav, men gongdin seinastu árini hevur verið, at bøndurnar gerast færri i tali og garðarnir verða størri og størri. Krøvini til at reka bóndagarð eru eisini herd og hevur hetta gjørt, at tað er vorðið alsamt truplari at fáa lønsemi í bóndavirksemi.

Men nú fleiri bøndur saman hava gjørt íløgur í vatnkraftverk og framleiða el, sum tey selja, so er fíggjarliga grundarlagið undir landbrúkunum og jørðini í síni heild, grundleggjandi broytt. Í Norra eru ognarviðurskiftini soleiðis, at tey, ið eiga jørðina, sum liggur við áir, eiga eisini rættindini til at brúka vatnið til elframleiðslu.

Jardøla Kraft, vatnkraftverkið, sum varð vitjað á Gloppen-ferðini, er eitt av hesum vatnkraftverkum. Í Jardøla Kraft eru tilsamans 16 eigarar, allir eigarar av jørð kring ánna, sum kraftverkið fær vatn frá. Jardøla Kraft framleiðir 21 GWT um árið. Umleið 1.000 húsarhald fáa el frá vatnkraftverkinum. Íløgan í vatnkraftverkið var tilsamans umleið 24 mió. norskar krónur.

Framleiðslan og umsetningurin í krónum og oyrum er tó tengd at hvussu nógv tað regnar og prísinum á el. Í 2009 lá umsetningurin á umleið 9 mió. kr., meðan umsetningurin í 2010 var áleið helvtina av hesum. Í ár hevur gingið munandi betur enn í fjør, tí regnnøgdirnar hava verið størri, samstundis sum prísirnar hava verið betur.

Ein av eigarunum av Jardøla Kraft, sum vístu okkum runt og greiddi frá vatnkraftverkinum, segði, at fyri tey, sum fyrr høvdu livað av landbrúkinum, var hetta eitt sera gott, og fyri summi eitt avgerandi ískoytið fyri framhaldandi at kunna búgva á staðnum.



**Ein av eigarunum av Jardøla Kraft greiðir frá**

## Entreprenørskapur í barnagarði í Norra

Í Norra verður dentur lagdur á entreprenørskap heilt frá barnaárunum. Í barnagarðurin Teina barnehage í bygdini Reed í Gloppen kommunu, hava tey í 15 ár havt ein entrepenør-barnagarð, tey hava í 15 ár havt ein høsnagarð við barnagarðin.




**Teina Barnehage, barnagarður við høsnagarði**




**Børnini halda sjálvi skil á**

Í dag hava tey í Teina barnehage tilsamans 70 hønur, sum børnini passa fult og heilt. Tað eru børnini, sum umbiðja fóður og fóðra. Børnini savnað eisini eggini saman, vaksa tey og leggja tey i eggjabakkar. Á eggjabakkunum hava teg egna etikettu, sum ein pápi hevur gjørt, og sum verður prentað ókeypis í einum fotohandli hinumegin vegin við barnagarðin. Børnini siga sjálvi frá, tá etikettirnar ganga undan, og so verða fleiri prentaðar.

Hvønn ónsdag verða eggini seld til foreldur, ommur og abbar og grannar. Hønurnar skulu sjálvsagt eisini passast í vikuskiftinum, jólaaftan, páskaaftan os.fr., og hesa uppgávu skiftast børnini um at loysa, og hetta hevur ongantíð verið nakar trupulleiki.




**Britt Glomnes Willumsen leiðari av Teina Barnehage greiðir frá**

Læringsmøguleikarnir í samband við at hava ein høsnagarð á barnagarðinum eru næstan ótømandi. Tað var eisini týðuligt, at høsnagarðurin hevði stóran týdning fyri trivnaðin hjá børnum í barnagarðinum.

Men ikki bara fyri børn í barnagarðinum, men eisini fyri børn og ung í Reed sum heild, er høsnagarðurin vorðin ein ímynd av bygdini. Hetta kom eisini fram í einari skrivikapping, har næmingar í fólkaskúlan skuldu geva eina ímynd av sínari bygd, tá vístu øll uttan undantak á, at høsnagarðurin í barnagarðinum var ein av ímyndunum í Reed.

## Entreprenørskapur í barnagarðin

Teina barnehage hevur eisini fingið viðurkenning fyri sín entreprenørskap tá umræður høsnagarðinum. Í Norra er dentur lagdur á entreprenørskap heilt frá barnaárunum og tí hava fleiri barnagarðar í Norra eisini valt at byggja inn ymisk sløg av entreprenørskapi. Í Teina barnahage gjørdist tað høsnagarður.



**Høsnarhúsið í Teina Barnehage**

Komandi ár verða barnagarðarnir í Reed (Teina Barnehage) og Byrkjelo lagdir saman, tá fylgir høsnagarðurin við. Meiri um samanleggingina av barnagørðunum báðum í næstu grein.

# Góða tíð til at leggja stovnar saman

I grannabygdunum Reed og Byrkjelo í Gloppen kommunu í Norra vóru inntil fyri stuttum tveir barnaskúlar og tveir barnagarðar. Nú eru skúlarnir og barnagarðarnir lagdir saman.



**Britt Glomnes Willumsen leiðari av samanlagda barnagarðinum greiðir frá**

Grannabygdirnar Reed, 365 íbúgvar, og Byrkjelo, 300 íbúgvar, liggja báðar við vatnið Breim og verða vanliga undir einum nevndar Breim ella Breimsbygda. Inntil fyri stuttum hava bygdirnar báðar havt hvør sína barnaskúla og hvør sín barnagarð. Men nú eru skúlarnir lagdir saman, eru fluttir til Byrkjelo, har tann betri skúlabygningurin var. Meðan barnagarðarnir eru lagdir saman og skulu verða i Reed, har tey komandi ár flyta í nú niðurlagda barnaskúlan, sum verður umbygdur til endamálið.

Á ferðini i Norra varð vitjað í verandi barnagarði í Reed, Teina Barnehage. Leiðarin í Teina Barehage, Britt Glomnes Willumsen, er eisini settur sum leiðari í nýggja samanlagda barnagarðinum og greiddi hon frá tilgongdini fram ímóti samanlegging av barnagørðunum báðum.

Avgerðin um samanlegging av barnagørðunum varð tikin í 2010, men barnagarðarnir flyta ikki í umbygda barnaskúlan fyrr enn á heysti 2012. Leiðari fyri nýggja stovnin varð tó settur beinanvegin og hevur hon staðið fyri arbeiðinum við samanlegging.

Leiðarin leggur dent á, at tað hevur havt stóran týdning fyri tilgongdina, at tey hava havt góða tíð til at arbeiða við samanleggingini: *Giv tid! Skynd dig langsomt*. -Hetta hevur givið okkum møguleika at brúka tíð og orku uppá at taka tað besta frá hvørjum stovni við i nýggja stovnin, umframt at starvsfólkini eisini eru tikin við í tilgongdini. -Av tí, at talan er um samanlegging av tveimum stovnum úr ymiskum bygdum og við ymiskari bakgrund, so hevur tað havt stóran týdning, at vit hava havt møguleika at gjøgnum arbeiða hvussu nýggi stovnurin skal skipast, herundir eisini hvørjar tænastur stovnurin skal veita, vísti leiðarin á.

Í Reed hava tey ein sokallaðan entreprenør-barnagarð, t.v.s. at tey á barnagarðinum hava ávíst virksemi, í hesum førinum ein høsnagarð við 70 hønum (les meiri um tað á síðu 17). Barnagarðurin i Byrkjelo hevur hinvegin lagt seg eftir námsfrøðiliga og trivnaðar partinum, umframt at tey hava ein spennandi urtagarð við grønmeti.

Tann eini stovnurin kann sigast verða meiri praktiskt orienteraður, meðan hin er meiri pedagogisk orienteraður. Í samanleggingini fara tey at taka bæði hesi viðurskifti við í nýggja stovnin. Hetta setur sjálvsagt krøv til at starvsfólkini læra um pedagogisku tilgongdina, sum tey hvør í sær hava í dag. Aftur her, hevur tað havt týdning, at tey hava havt góða tíð til at arbeiða við tilgongdini fram móti samanleggingini, vísti Britt Glomnes Willumsen leiðari á.

Breim Barnehage, sum nýggi samanlagdi barnagarðurin eitur, hevur egna heimasíðu: www.breimbarnehage.no



**Nýggjur graslíkisvøllir við barnagarðin í Reed**

## Utviklingslag ï  halda fokus á menning í bygdini

Bæði í Norra og Danmark eru traditiónir fyri at hava lokal menningarráð, í Norra *utviklingslag* og í Danmark *udviklingsråd*. Í bygdini Hyen í Gloppen kommunu er endamálið við lokala menningarráðnum í breiðasti tulking at arbeiða við menning í lokaløkinum.



**Hyen liggur í vøkrum umhvørvi**
*Mynd: www.hyen.com*

Í Hyen (umleið 600 íbúgvar), sum er í vestara parti av Gloppen Kommunu, ein góðan tíma í bili frá kommunala høvuðssætinum Sandane, hava tey eitt *Utviklingslag*, sum hevur stóran týdning fyri trivnaðin í bygdini.

Í Hyen Utviklingslag eru 6 limir. Limirnar verða valdir á árligum ársfundi, har øll bygdafólk, sum møta, hava eina atkvøðu. Hyen Utviklingslag varð stovnað miðskeiðis í 1990unum, tí fólkið í bygdini vildu taka hond um skeivu gongdina í tilboðum til borgara og fólkatalinum í bygdini.

Eftir umleið 15 ár er listin við átøkum og verkætlanum, sum Hyen Utviklingslag hevur verið partur av, langur og fjølbroyttur. Í mun til føroysku staðbundnar nevndir, sum hava ein ráðgevandi leiklut yvirfyri

kommunustýrinum, so er leikluturin hjá norsku menningarráðunum væl breiðari. Hyen Utviklingslag er og hevur verið partur av verkætlanum, sum fevna um alt frá smáum lokalum verkætlanum til størri verkætlanir, sum knýta at sær bæði kommununa, fylket (landslutin), landið og størri privatar fyritøkur.

## Tryggja lokalar tænastur

Smáum lokalu verkætlanirnar fevna t.d. um at tryggja borgarunum atgongd til góðar tænastur. Til dømis tryggjaði Hyen Utviklingslag at lokali bensin-sølustøðin varð varðveitt og skipað sum ein sjálvtøku-pumpa við tilknýtið til bensinstøðina í Sandane. Hetta hevði týdning fyri borgarar í Hyen, tí fjarstøðan til Sandane er ein góðan tíma í bili, og um veturin er ikki altíð lætt at koyra til Sandane.

Hyen Utviklingslag hevur eisini arbeitt nógv við at tryggja at øll húsarhald í Hyen fáa atgongd til breiðband. Høvuðsparturin av Hyen er Hyen-bygd, men nógv fólk búgva eisini í dalinum vestanfyri og eystanfyri Hyen. Hesi hava nú fingið breiðband, eftir at Hyen Utviklingslag hevur sett fokus á tað.

## Lokal tænastu- og frítíðartilboð

Hyen Utviklingslag hevur eisini havt undangongu leiklutin, tá lokal tænstu- og frítíðartilboð skulu mennast og útbyggjast.



**Skjótifelagið nýggj høli**

Í ár hevur Hyen Utviklingslag t.d. arbeitt við at fáa lagt graslíkisvøll á fótbóltsvøllin, hetta arbeiði verður í stóran mun gjørt av sjálvbodnum, tó letur kommunan eisini fíggjarligan stuðul. Somu viðurskifti eru

galdandi fyri lokala skjóti-felagið (skjóti-ítróttur er stórur í Norra), sum í oktober tók í nýtslu nýggj høli í kjallaranum á nýggja barnagarðinum.



**Nýggi barnagarðurin í Hyen**

Nýggi barnagarðurin varð tikin í nýtslu í juni í 2010. Og hóast talan er um eina verkætlan, har kommunan hevur stóra fíggjarliga leiklutin, so hevur Hyen Utviklingslag eisini verið partur av verkætlanini.

## Tryggja vegin til Sandane

Inntil í 1989 hevði Hyen bara sjóvegis samband við kommunala høvuðssætið í Sandane. Men í 1989 fekk Hyen vegasamband við eystara part av Gloppenfjørðin, har Sandane eisini er. Um veturin er tó nógvur kavi á leiðini og kava-skriðulop eru ikki óvanlig. Av somu orsøk hevur Hyen Utviklingslag lagt stóran dent á, at fáa fokus á at fáa tryggja vegasambandi við Sandane. Hetta er ein uppgáva sum liggur hjá fylkinum Sogn og Fjordana fylke. Og á vitjanini í Hyen í oktober 2011 sóu vit eisini hvussu arbeitt varð við hesum framvið høvuðsvegnum

## Bolyst og flyt aftur til Hyen

Í Hyen halda tey tað hava stóran týdning, at ung fólk leita sær vitan, førleika og upplivingar uttanfyri Hyen, men tey vilja gjarna hava tey aftur til Hyen. Kjartan Aa Berge, sum nú er formaður í Hyen Utviklingslag vísir á, at tey leggja stóran dent á at fortelja fólki hvussu fantastiskt tað er at búgva í Hyen – eisini teimum Hyen-búgvum, sum í dag búgva aðrastaðni. Vit hava egna heimasíðu, har vit fortelja um hvat sker í Hyen, har fylgja nógv við, eisini tey, sum búgva aðrastaðni. Harumframt hava vit eisini nøkur stór tiltøk hvørt ár, sum savna fólk aftur til Hyen, sigur Kjartan Aa Berge.



**Leiðarin av Hyen Utviklingslag og skúlastjórin (longst til vinstru)**
*Mynd: Erik Dyhr Thomsen*

Um høgtíðirnar, t.d. á jólum, savna vit Hyen-búgvar, sum búgva aðrastaðni, men sum eru komnir heim at halda jól, og tosa við tey um, hvat skal til í Hyen fyri at tey vilja flyta aftur. Vit í Hyen arbeiða við at skapa *bolyst*, at gera Hyen til eitt gott stað at búgva, og vit taka eisini væl ímóti øllum, sum flyta til Hyen, antin tað eru gamlir Hyen-búgvar ella onnur, sigur Kjartan Aa Berge.

## Lokal menningarráð í Føroyum

Lítið er at ivast í, at tað hevði verið ein stór styrki fyri nógvar bygdir og nógv økið í landinum, um vit í Føroyum høvdu traditiónir fyri lokalum menningarráðum. Við lokalum menningarráðum høvdu vit kunna havt eina javna arbeiðsgongd tá umræður lokala menning. Heldur enn at gera smærri upplop av og á orsaka av akuttum trupulleikum ella avbjóðingum (at handla *re-aktivt*), so hevði við menningarráðum borið til alla tíðina at arbeiða miðvíst við at skapa betri umstøður (at handla *pro-aktivt*).

Á hesum økinum hava vit nógv at læra av grannum okkara fyri eystan.

## Meiri um Hyen

Tú kann annars lesa meiri um Hyen og virksemi í Hyen á www.hyen.com

## Gamalt fjós umbygt til matar- og veitslusal

Landbúnaður er ein tann týdningarmesta vinnan kring Gloppenfjørðin og hevur verið tað í mong ættarlið. Men við moderniseringini av landbúnaðinum, so eru fleiri av gomlu bóndahúsunum farin í søguna, men nøkur eru eisini varðveitt í øðrum hami.



**Kvia, Gloppen**

Í Kvia við Breimsvatn í Gloppen kommunu gjørdu tey fyri nøkrum árum síðani av, at umbyggja gamla fjósið til ein matar- og veitslusal. Hølið er ikki serliga stórt, eini 6 x 10 m., og hava tey roynt at byggja um, soleiðis at fjósið líkist upprunanum við grótgrund og flagtaki.

Maturin, ið tey borðreiddu, hevði í høvuðsheitum uppruna í tí lokala. Hendan dagin vit vóru framvið var talan um ymisk sløg av seyða-, svína- og neytakjøti og fiski.



**Kvia, Gloppen**

Hølini vóru framúr hugnalig og eru eisini nógv brúkt, millum annað høvdu tey royala vitjan í 2006 tá norska krónprinsaparið vitjaði.

## Frivillegsentralen ï  sjálvboðin hjálpa

Ein afturvendandi kjarna í nógva virkseminum í Gloppen kommunu er sjálvboðið arbeiðið. Soleiðis er eisini í *Frivillegsentralen*.




**Frivillegsentralen, Gloppen**

Í Norra hevur man frá landspolitiskari síðu fyri nógvum árum síðani staðfest, at tað almenna hevur ikki orku ella møguleika at veita allar tænastur til øll. Av somu orsøk varð fyrst í 1990unum farið undir eina skipan, har land og kommunur lata stuðul til sonevndar Frivillegsentralar. Skipanin ber í sær, at Landið ber 60% av útreiðslunum, meðan tær kommunur, sum hava Frivillegsentral, bera 40% av útreiðslunum. Í dag eru tilsamans 371 Frivillegsentralar í Norra, ein teirra er í Gloppen kommunu.

Í Gloppen kommunu varð Frivillegsentralen stovnaður í 1991. Á Frivillegsentralen starvast tvey fólk í hálva tíð, sum eru lønt av stuðulsjáttanini frá kommununi og landinum.

Hesi árini Frivillegsentralen hevur verið virkin, hava tey skipað eina røð av tænastum, har fólk sjálvboðin og ókeypis lata sína arbeiðsmegi. Til dømis hevur Frivillegsentralen øll árini staðið fyri útkoyring av mati til pensjónistar o.o. Maturin verður gjørdur í sjúkrahúskøkinum og síðani koyra trý sjálvboðin hvønn dag mat út til umleið 60 fólk. Summi koyra út hvønn dag, meðan onnur koyra ein ella tveir dagar um vikuna, og eru sostatt fleiri fólk knýtt at hesi skipan. Tey fáa øll endurgoldið bensin-nýtsluna, men annars onga samsýning.

Frivillegsentralen hevur harumframt verið sera virkin tá umræður at byggja brýr millum ættarlið og millum ymisk fólkasløg. Til dømis skipar Frivillegsentralen fyri at ung geva pensjónistum frálæru í at brúka fartelefon og teldu. Frivillegsentralen skipar eisini, saman við Reyða Krossi, fyri felags átøkum, har fólk úr ymiskum londum við ymiskari etniskari bakgrund koma saman við lokalum fólki, t.d. við felags bindiklubbi. Endamálið við hesum átøkum er, umframt tað sosialu samveruna, eisini er at læra tey fremmandu málið og mentanina. Tiltøkini hava verið væleydnað og sera væl umtókt.

Frivillegsentralen í Gloppen skipar eisini fyri eina røð av café'um, har endamálið er at geva fólkið møguleika at koma út og møtast. Nógv eldri sita einsamøll, men hvørja viku fáa tey møguleika at koma mandagscafé – hetta er ein skipan, sum er líkari okkara Dagtilhaldum, har eldri møtast.



**Tvey fólk arbeiða á Frivillegsentralen**

Á Frivillegsentralen greiða tey frá, at høvuðsendamálið hjá teimum er at leggja lunnar undir "at fólk kunna møtast ella koma saman". Av somu orsøk hava tey eisini skipanir við vitjunar-vinum og vitjanum á stovnum, har fólk, sum ynskja ella tørva vitjan, siga frá – og so verða tey knýtt saman við einum ella fleiri av teimum nógvu fólkunum sum vilja hjálpa, greiða tey á Frivillegsentralen frá.

Yvirskriftin á forsíðuni á faldaranum hjá Frivillegsentralen "Møte mellom Menneske" er eisini høvuðsgrundarlagið, ið Frivillegsentralen virkar undir. At enda verður víst á, at tey á Frivillegsentralen tey seinastu árini hava merkt ein vaksandi tørv.

# Fáa vit nóg nógv fyri pengarnar?

*Lesileiðbeining: Les alla greinina, hugsa um og hygg at hentleikunum – og legg so at enda merki til kostnaðin!*

Á vitjan í Gloppen í Norra í samband við verkætlanina **Lærings og inspirationsnetverk for aktive ildsjæle i Norden** varð eisini vitjað á nýggjum skúla- og mentanardepli, *Trivselshagen* í Sandane, sum er høvuðsbýur í kommununi.



**Trivselshagen**

Í Sandane hevur í mong ár verið ein studentaskúli. Við nýggja Trivselshagen, sum er bygdur fastur í studentaskúlanum og sum varð tikin í nýtslu í 2008, fekk studentaskúlin og fingu ikki minst fólk í Gloppen kommunu ómetaliga góðar umstøður innan skúla- og mentan.

Tá hugsað verður um, at tað í Gloppen kommunu búgva umleið 5.700 fólk, so eru tilboðini og umstøðurnar í Trivselshagen heilt framúr góðar – og eiga neyvan sín líka í Føroyum!

Trivselshagen er ikki nøkur fantastisk arkitektonisk eind at síggja uttanífrá. Ikki rundur ella bylgjutur, sum teir nýggju skúladeplarnir í Føroyum. Nei, ein fýrkantaður bygningur við onkrum lítlum útbygningi her og der. Og tá tú kemur til høvuðsinngongdina, so sær bygningurin í veruleikanum ikki út av so nógvum. Man fær ikki eina mynd av hvussu nógv hesin bygningur í veruleikanum rúmar. Men komin inn um, gerst greitt, at virksemi í bygninginum er fjøltáttað – skelti við inngongdina gevur eina ábending.




**Forhøll**

Og á rundferðini í Trivselshagen verður ein ferð eftir ferð tikin av bóli…!

## Musikkskúli og film- og mediabreyt



**Musikkskúlin Trivselshagen**

Høgrumegin forhøllina er nýggjur musikkskúli, *Gloppen Kulturskole,* við øllum nýmótans hentleikum. Har er ein hópur av venjingarhølum, bæði til einstaklingar og størri høli til bólkar, øll hølini ljóðisoleraði sjálvsagt.




**Films- og miðlabreytin í Trivselshagen**
*Mynd: Erik Dyhr Thomsen*

Vinstrumegin forhøllina eru hølini hjá films- og miðlabreytini hjá studentaskúlanum. Almenna føroyska kringvarpið hevði helst øvunda norsku næmingunum, tí umframt framúr góða nýggja tøkniliga útgerð, so hava næmingarnir eisini fleiri serstovur til ljóð og film, m.a. eitt sokallað green-room. Leggjast kann afturat, at næmingar á films- og miðlabreytini framleiða hópin av sjónvarpslýsingum, sum verða sendar í norskum sjónvarpi.

## Biograf, sum kommunan rekur

Í Trivselshagen er eisini biografsalur við øllum nýmótans hentleikum, m.a. við 3D-biografi og nýggjastu ljóðútgerðini. Biografsalurin verður eisini brúktur sum auditorium, t.v.s. til fyrilestrar- og fundarsal. Biografurin hevur góð 100 sitipláss.



**Biografur**

Tá áhugaverda er, at biografurin verður rikin av Gloppen kommunu og ikki av privatum felagið. Orsøkin er, at kommunan vil tryggja, at ungdómar í Gloppen kommunu hava somu tilboð sum ungdómar aðrastaðni, og tá grundarlag ikki er fyri privatum biografi, hevur kommunan átikið sær hendan leiklut. Á skránni hjá biografinum eru allir teir nýggjastu filmarnir.

## Stórur konsertsalur

Umframt biografsal til 100 fólk, so er eisini í Trivselshagen stórur bergtakandi konsertsalur við 400 sitiplássum. Konsertsalurin hevur eisini eina "orkestur-grøv" til symfoniorkestur. Og sjálvandi hava tey eitt Steinway flygul til klaverkonsertir. Aftanfyri pallin eru hølir, har tónleikarar, sjónleikarar, dansarar og onnur kunnu gera seg kláran til palframførsluna – hetta rúmið er ljóð-isolerað, so at tey ikki verða órógvaði av tí, sum fer fram á pallinum hinumegin veggin.

Umframt til tónleika-, dansi- og sjónleikaframførslur, so verður konsertsalurin eisini brúktur í samband við onnur tiltøk. Millum annað varð valfundur í konsertsalinum í samband við kommunuvalið í heyst, hesin fundur varð sendur beinleiðis í sjónvarpinum.



**Konsertsalur**

## Venjingarhøli til dans og drama

Við tað at møguleiki er at velja dans og drama á breyt í studentaskúlanum, so hava tey í Trivselshagen eisini lagt seg eftir at hava góðar umstøður á hesum økinum.



**Tað stóra dansi-venjingarhøli**

Tvey professionel dansi-venjingarhøli eru í Trivselshagen, eitt lítið og eitt stórt. Og sum ein lítil detalja varð víst á, at gólvið í dansi-venjingarhølunum er av sama slagi sum í opera'ini í Stockholm. Leiðarin fyri Trivelshagen greiðir frá, at tey hava lagt stóran dent á, at umstøðurnar eru heilt í topp, tí skulu tey fáa góðar dansi-undirvísarar, og góðar undirvísarar sum heild, so mugu tey eisini hava umstøður, sum draga til sín dugnaligar undirvísarar. Borgarstjórin í Gloppen kommunu, Anders Rysdal, sum eisini var við á rundvísingini í Trivselshagen, legði afturat, at ein kokkaskúli, sum vil hava bestu kokkar sum undirvísarar, hevði ikki drigið til sín góðar kokkar, um teir keyptu ein gamlan brúktan køk – tí hava tey í Gloppen eisini lagt seg eftir at skapa best gjørligu umstøður, fyri at draga til sín góðar undirvísarar.

## Dramasalur

Umframt dansi-hølini, so er eisini eitt professionel venjingahøli til sjónleik (drama).



**Dramasalur**

Dramasalurin er gjørdur soleiðis, at kulissir kunnu setast upp í venjingarhølunum. Gólvið er specialgólv. Verða kulissur negldar í gólvið, so sæst onki til nakað seymhol, tá kulissurnar verða tiknar niðuraftur – tí gólvið "lukkar" seg umaftur seymholdið.

## Undirvísingarhøli til fjarlestur

Í Trivselshagen er sjálvsagt eisini eitt undirvísingarhøli til fjarlestur við øllum hentleikum sum krevjast til fjarlestur. Fjarlestrarhøli verður nógv brúkt, bæði í samband við útbúgvingartilboð í Norra og uttanfyri Norra.



**Fjarlestrarhøli**

## Gott bókasavn og ævintýrrúm

Spennandi rundferðin í Trivselshagen endaði í bókasavninum, sum umframt at verða bókasavn fyri studentaskúlan eisini er býarbókasavn í Sandane. Bókasavnið hevur eisini bókasavnsdeildir í fleiri av bygdunum í kommununum, tey bókasøvnini er oftast skipaði saman við lokala skúlabókasavninum. Samstarvið við bygdabókasøvnini ger, at tilboðini og tænastan á bygdabókasøvnunum eru sera góð.



**Bókasavn**

Bókasavnið í Trivselshagen er skipað soleiðis at allar bókareólir eru á hjólum. Orsøkin er einføld: Tá bókasavnið skal brúkast til fyrilestrar ella bókakvøld, verða bókareólirnar trillaðar til síðis, og so er eitt stórt høli tøkt til endamálið. Umframt stóra høli, so er eisini eitt lesi-høli í bókasavninum, sum fólk kunnu brúka, ynskja tey at sita í friði.

Umframt bøkur, so ber eisini til at lána tónleik og ljóðbøkur á bókasavninum, sum eisini hevur vanlig dagbløðini liggjandi.

Á bókasavninum er tráðleyst internet, soleiðis at tú við egnari farteldu kann sleppa á internetið, men harumframt eru eisini nakrar teldur við internetsambandi á bókasavninum, sum fólk kunnu brúka ókeypis.

Í bókasavninum er eisini eitt ævintýr-rúm, sum m.a. verður brúkt til at lesa søgur fyri børnum – áhugavert er, at gólvið alt var tað bera bókstavir.

## Góð kantina

Sjálvsagt er eisini ein góð kantina í Trivselshagen.



**Kantina**

Kantinan verður í dagtímunum brúkt í samband við studentaskúlan og musikkskúlan, og av vitjandi á bókasavninum, sum jú er eitt alment bókasavn. Um kvøldið verður kantinan brúkt í samband við filmsvísing í biografinum. Kantina verður eisini brúkt í samband við konsertir og sjónleika- og dansiframførslur í stóra konsertsalinum.

## Alt hetta fyri einans 115 mió. kr.

Tað heilt ófatiliga við Trivselshagen er, at allir hesir hentleikar, sum nevndir eru omanfyri, einans hava kostað 115 mió. kr., sum Gloppen kommune og Sogn og Fjordane fylke hava hildið kostnaðin av.

Eftir vitjanina í Trivselshagen í Sandane í Gloppen kommunu stendur spurningurin: *Fáa vit nóg nógv fyri pengarnar, tá vit byggja slíkar bygningar í Føroyum?*

## Byggja út Trivselshagen

Leggjast kann afturat, at tey eru í ferð við at byggja út Trivselshagen. Byggjast skal út fyri aðrar 115 mió. kr. – og í ætlanini er m.a. svimji- og baðiland, fimleikahøll (líkari teirri við endan av Tórsvøll), og ítróttarhøll, umframt undirvísingarhølir og hølir til lærarar.

Meiri kunning um Trivselshagen finnur tú á www.trivselshagen.no



**List í Trivselshagen**

## Landbúnaður og fiskivinna ï og ungdómurin

Gloppen kommune er landbúnaðarøkið burturav, men hóast hetta, so hevur áhugin fyri landbúnaðin verið lítil, serliga hjá ungdóminum – tað hevur verið trupult at fáa ungdómin at vísa landbúnaðin og virksemi kring landbúnaðin áhuga. Hetta eru eisini avbjóðingar, sum vit kenna til í Føroyum, har ungdómurin vísir fiskivinnuni lítlan áhuga. Í Gloppen hava bøndur tó roynt at virka fyri, at ungdómurin fær størri áhuga fyri landbúnaðinum, og hevur hetta í ávísan mun eydnast.

Bøndur í Gloppen hava saman við framhaldsdeildini í fólkaskúlanum skipað soleiðis fyri, at allir næmingar hvørt ár fara runt á bóndagarðar. Hetta samstarv er partur av breiðari samstarvi, sum er fingið til vega av Sogn og Fjordane Bondelag og fólkaskúlunum í Sogn og Fjordane fylke. Endamálið við samstarvinum er at geva skúlanæmingum í framhaldsdeildini innlit í og førleikar um bóndalívið, og hartil ikki minst at geva teimum íblástur til at velja eina útbúgving og eitt yrki við tilknýtið til landbúnaðin.



**Skúlanæmingar á *Gardsarbeid* á Felda Fellesfjøs**
*Mynd: www.bondelaget.no*

Hesar dagarnir á bóndagørðunum læra tey um virksemi á einum bóndagarði og sleppa eisini at taka lut í gerandisdegnum á einum garði undir heitinum *gardsarbeid*. Næmingarnir verða býttir í bólkar, soleiðis at talan ikki gerst um stórar bólkar, har tann einstaki fær lítið burturúr.

Virksemi á einum vanligum bóndagarði í Gloppen fevnir eins og í Føroyum um neytahald við mjólka- og kjøtframleiðslu, og hartil nógv virksemi viðvíkjandi sjálvum jarðarbrúkinum. Men harumframt hava nógvir bóndagarðar í Norra eisini ber (t.d. jarðber) og skógarøkið, sum krevja røkt – og var hetta eisini galdandi fyri Felda Fellesfjøs, sum vit vitjaðu á Norra-ferðini.

Felda Fellesfjøs er ein samanlegging av tveimum bóndagørðum. Í dag hevur Felda Fellesfjøs 80 mjólkneyt og framleiða teir harumframt umleið 20 tons av kjøti um árið. Í samband við samanleggingina av

bóndagørðunum varð eisini gjørdar íløgur í modernisering av fjósinum, soleiðis at alt sum kann automatiserast er automatiserað.



**Per Asbjørn Felde (t.h.) greiðir frá**

Per Asbjørn Felde, sum er annar av eigarunum av Felda Fellesfjøs, letur sera væl at samstarvinum við fólkaskúlan. Per Asbjørn vísti á, at hetta hevur økt um áhugan og vitanina hjá ungdóminum um virksemi á einum bóndagarði, og hevur eisini ført við sær, at fleiri skúlanæmingar søkja um at sleppa á bóndagarð í starvsvenjing.

Per Asbjørn greiddi frá, at umframt dagarnir á bóndagørðum, hava framhaldsdeildirnar eisini spælt eitt landbúnaðar-strategispæl (telduspæl), har næmingar kunnu verða bøndur í eitt ár, við øllum teimum uppgávum og avbjóðingum, sum tað førir við sær. Sostatt hava tey fingið innlit í tann veruliga gerandisdagin umvegis *gardsarbeid* og í árið hjá einum bónda umvegis landbúnaðar-strategispælið.

## Hví ikki eisini í føroysku fiskivinnuni?

Samstarvið millum landbúnaðin og fólkaskúlan í Gloppen er eitt samstarv, sum lætt kundi verið skapt millum føroysku fólkaskúlarnir og fiskivinnuna á landi og partvíst eisini fiskivinnuna á sjógvi. Í Føroyum hava vit neyvt somu trupulleikar á fiskivinnuøkinum, sum bøndur kring Gloppenfjørðin hava havt á landbúnaðarøkinum: *Ung hava lítlan áhuga í og kennskap til føroysku fiskivinnuna*[1].

[1] Hetta verður eisini staðfest í stórari kanning, sum Granskingardepilin gjørdi millum allar næmingar í 9. flokki og í 2. flokki á studentaskúlunum í 2004. Kanningin, sum varð gjørd av Olgu Biskopstø og Bjarna Mortensen, er útgivin sum *Arbeiðsrit 9, 2004: Ung, útbúgving og fiskivinna*, og kann takast niður á www.socdev.fo undir útgávur.

Eitt samstarv millum fólkaskúlar og fiskivinnuna hevði kunna broytt hendan veruleika. Ikki tað at endamálið er at fáa allan okkara ungdóm at arbeiða sum ófaklærd á einum flaka- ella fiskavirki. Nei, endamálið er at fáa ungdómin at fáa áhuga fyri og kennskap til fiskivinnuna, soleiðis at tey í nógv størri mun gerast varug við at tað er ein røð av útbúgvingarmøguleikum innan fiskivinnuna og við tilknýti til fiskivinnuna. Í dag hevur føroyski ungdómurin, umvegis útlendskar sjónvarpsrásir, onkursvegna størri innlit í gerandisdegnum á einum sjúkrahúsi ella í einum rættarsali enn gerandisdagin hjá okkara høvuðsvinnu.

Fingu føroysku skúlarnir hartil eitt fiskivinnu-strategispæl líkt landbúnaðar-strategispælinum í Norra, so høvdu næmingar í nógv størri mun havt møguleika at fingið innlit í hvussu føroyska fiskivinnan virkar. Vit skulu á hesum økinum ikki skapa nýggja vitan og førleika í Føroyum, tí í Føroyum er ein fyritøka, Simprentis, sum hevur drúgvar royndir innan júst hetta økið. Simprentis menti í 2002 spæli OilSim, sum er eitt olju-strategispæl, sum í dag verður brúkt kring allan heim.




**OilSim-strategispælið hjá Simprentis**

*Sí eisini www.oilsim.com*

Endamálið við OilSim-strategispælinum er tað sama sum við landbúnaðar-strategispælinum: *At skapa øktan áhuga hjá ungdóminum fyri oljuvinnunu*. OilSim spælið varð upprunaliga ment av Simprentis saman við føroysku miðnámsskúlunum og er síðani og verður framvegis víðari ment av Simprentis. Simprentis hevur sostatt bæði førleika og royndir í at menna slík strategi-telduspøl.

Upplagt er, at føroyskir myndugleikar – í hesum sambandi Mentamálaráðið og Fiskimálaráðið – saman við føroysku fiskivinnuni og Simprentis fara undir at menna eitt fiskivinnu-strategispæl. Eitt slíkt spæl kann í prinsippinum fevna um alt frá einum fiskiveiðuparti, har tú ert skipari á fiskiskipi, til at reka eitt flaka- ella fiskavirki og selja fiskaúrdráttir, til tað at verða myndugleikin, sum umsitur fiskiveiðuna kring Føroyar.

Flest øll lond á okkara leiðum, sum hava fiskivinnu sum ein týðandi vinnuveg, hava somu trupulleikar sum vit: *Áhugin fyri fiskivinnuni er lítil og vinnan hevur trupulleikar við at draga til sín nýggj fólk.* Av somu orsøk

er lítið at ivast í, at eitt fiskivinnu-strategispæl hevur grundarlag fyri at røkka eins víða og OilSim spælið, sum verður brúkt kring allan heim. Íløgan í hetta spælið kann sostatt eisini við tíðini gerast ein inntøka.

GRANSKINGARDEPILIN FYRI SAMFELAGSMENNING